Eldraráðið í Tórshavnar kommunu
Tórsgøta 21, 100 Tórshavn
eldrarad@torshavn.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Eldraráðið 2021 – 2024

| | |
|---|---|
| Fundur: | Nr. 3 |
| Tíð: | 04.03.2021 kl. 13.00 |
| Stað: | Tilhaldið í Tórsgøtu |

**Møtt:** Katrin Holm, forkvinna, Bjørghild Djurhuus, næstforkvinna, Julianna Klett, kassameistari, Marin Rasmussen, limur, og Petur Rouch, skrivari.

Varalimir vóru innkallaðir til fundin.
**Hesir møttu:** Ingigerð á Trøðni, Eyrith Leyni og Ingrid Henriksen.

**Fundarskrá:**

1. Kunning um Eldraráðið og mannagongdir í arbeiðinum
2. Kunning frá varalimum um teirra hjartamál
3. Kunning um fundin við Tilhaldið
4. Ymist

<u>AD 1 Kunning um Eldraráðið og mannagongdir í arbeiðinum</u>

Eldraráðið kunnaði um hjartamálini hjá ráðnum komandi tíðina. Hesi kunnu lesast í fundarfrágreiðing 1, sum liggur á vanganum hjá Eldraráðnum á heimasíðuni hjá Tórshavnar kommunu (TK). Ætlanin er at halda fund við varalimum hvønn ársfjórðing.

<u>AD 2 Kunning frá varalimum um teirra hjartamál</u>

Varalimir fingu høvi at greiða frá teirra hjartamálum.

Ingrid Henriksen greiddi frá at hennara hjartamál er, at Heimarøktin verður endurskoðað, so at reingerð aftur verður ein natúrligur og ókeypis partur av heimarøktini.

Hon greiddi frá, at sum er fáa brúkarar í TK reingerð, sum tey rinda 170 kr. fyri um tíman, har tvey reingerðarfólk eru inni. Hvør fær reingerð verður avgjørt við visitatión, og upphæddin er óheft av inntøku hjá tí, sum fær reingerð. Restina rindar TK.
Tað er kommunurnar sjálvar, ið avgera, hvussu reingerðin verður skipað.

Ingrid greiddi frá at skipanin við reingerð er ymisk frá kommunu til kommunu. Í Klaksvík verða 200 kr. goldnar um tíman, og kommunan letur 50 kr. í stuðli. Í Vágum er gjaldið 300 kr. um tíman.

Til tað er at siga, at sum er eru tað sjúkrarøktarfrøðingar, heilsurøktarar, heilsuhjálparar og tíverri eisini alt ov nógv ófaklærd, sum taka sær av heimarøktini. Verður reingerð ein partur av skipanini, mugu helst professionel reingerðafólk involverast. Sum er hevur tann, ið fær heimahjálp, ikki rætt til at avgera hvat skal gerast úti í heiminum, tí tað er visitérað frammanundan.

Bjørghild Djuurhus greiddi í hesum sambandi frá, at t.d. Keypmannarhavnar kommuna hevur innført eitt sokallað klippukort. 10 vitjanir eru á kortinum, og fær borgarin loyvið sjálvur at avgera hvat tann eina vitjanin skal brúkast til. Royndirnar frá hesum vísa størri nøgdsemið, og tað er altíð gott við samavgerð. Nógvir borgarar nýta henda rætt til t.d kafévitjan, ein túr á kirkjugarðin v.m.

Eitt annað hjartamál hjá Ingrid er at ongin skal kunna sigast úr starvi vegna aldur. Hetta hevur verið frammi fyrr í Eldraráðnum, og vit kundu upplýsa, at eisini sitandi Eldraráð tekur fult undir við hesum sjónarmiði.

AD 3 Kunning um fundin við Tilhaldið

Avtalan við Tilhaldið um at hava opið um kvøldarnar varð umrødd. Sum skilst, so kann Eldraráðið ráða yvir stóru stovuni hóskvøld. Tosað varð um hvussu hesi hóskvøld kundu skipast, so fólk tóku tiltøkini til sín, soleiðis at tað við tíðini gjørdist ein natúrligur táttur hjá eldri fólki at seta hóskvøldini av til tiltøkini hjá Eldraráðnum.

Evnið tróta ikki. Umframt tey tiltøk, ið eru nevnd í fundarfrágreiðing 1 og 2, kom uppskot um at seta eitt kvøld av til at fáa ein koyrilærara at greiða frá hvat krevst til at fáa koyrikoyrt í dagsins samfelag, í mun til fyrr. Benny Eidesgaard hevur sagt seg vera fúsan at halda eitt slíkt kvøld. Hann ætlar at seta á stovn eina útvarpsrás fyri Tórshavn, har Eldraráðið eisini kann koma til orðanna.

AD 4 Ymiskt

Nógv fólk eru sjálvboðin vitjunarvinir hjá eldri, sum búgva einsamøll. Hetta kemur ofta væl við hjá hesum fólkum.
Marin Rasmussen greiddi frá at hon fregnaðist um, um nakar møguleiki mundi verða at fáa sjálvboðin vøkufólk at hjúkla um og vera hjá fólki, sum vóru ússalig og lógu til tað síðsta. Hon veit um fólk, har professionel hjálp ofta hevði komið væl við hjá sera sjúkum fólkum.

Bjørghild Djuurhus helt í hesum sambandi, at tað mest umráðandi var, at tey sum bjóða seg fram eru trygg við støðuna, og hetta nýtist ikki at vera lærd fólk. Royndirnar hjá henni eru, at summi avvarðandi gjørdist ótrygg og bangin um at vera um hesi fólk.

Ingrid Henriksen kunnaði um, at stavhokki-kvøld fyri eldri í Finsen er um at koma uppá pláss.
Poul Michelsen hevur donerað stavir til endamálið.

Petur Rouch kunnaði um møguleikar at nýta heimasíðuna hjá TK til at fáa í lag nærri samskifti við eldra ættarliðið, eisini við møguleikum at nýta Facebook.

Varalimir fáa nú fundarpengar, tá teir verða bodnir á fund, og ber tað ikki til hjá valdum limi at luttaka, verður varalimur innkallaður. Vanliga rindar TK fundarpengar 2 ferðir um árið. Í juli fyri fyrra hálvár og í februar fyri seinna hálvár.

Julianna Klett kunnaði um skriv, sum verður sent TK um atkomumøguleikar í Tilhaldinum.

Fundur lokin klokkan 14:45

Tórshavn 6. mars 2021
Petur Rouch,
skrivari